# Stappað kirkja til stuðulskonsert



**Vesturkirkjan var stúgstappað, tá Blái Krossur Føroya leygarkvøldið skipaði fyri stuðulskonsert í sambandi við bygging av nýggjum blákrossheimi á Nesi. Konsertin var ókeypis, men skipað varð fyri innsavning, har 52.660 krónur komu í kassan**

TÓNLEIKATILTAK
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*

Enn vantar nógvur peningur í til at fara undir at byggja nýtt blákrossheim, men tað fløvaði í kassanum, tá Bláí Krossur Føroya skipaði fyri eini sera væleydnaðari stuðulskonsert í Vesturkirkjuni í Havn leygarkvøldið.

Fleiri kend nøvn vóru á skránni. Til dømis Kristel Lisberg og pápi hennara, Jens Lisberg, sum tó ikki upptraðkaðu saman, trobadururin úr Vestmanna, Martin Joensen, og gospelkórið VOX.

Blákrossheimið arbeiðir í løtuni undir trongligum umstøðum í einum stórum sethúsum í Lynggøtu, har búfólkini búgva í 2-3 mans kømrum uttan wc og bað. Øðrvísi verður, tá nýggja heimið einaferð stendur liðugt. Pláss verður fyri 14 búfólkum, sum tá fáa einakamar við wc og bað.

Húsið verður 795 fermetrar stórt við einum stórum felagsrúmi í miðjuni, haðani beinleiðis atgongd er til kømur, skrivstovurúm og onnur rúm í húsinum.

Samlaða kostnaðarætlanin er upp á 10 mió. krónur, og í løtuni er eginpeningur millum tvær og tríggjar mió. krónur. Íroknað er grundstykki og planering, ið hevur eitt virði upp á eina mió. krónur, sum Nes kommuna hevur latið. Aðrir stuðlar hava higartil latið eina mió. krónur. Harafturat er nakað av innsavnaðum peningi.

Umframt kømur, skrivstovur og felagsrúm, sum eisini fer at virka sum kantina og forsamligsrúm, fer nýggja Blákrossheimið at hava viðgerðarrúm og eitt venjingarrúm.

- Ætlanin var at fara í gongd við byggingina longu í fjør, men av ymsum orsøkum lat hetta seg ikki gera. Mest tí, at bankarnir settu krøv um størri eginfígging, sigur Sverri Steinhólm, sum er formaður í Bláa Krossi Føroya. Hann torir ikki at seta tíð á, nær bygg-ingin kann fara í gongd, men vónar, at tað verður innan alt ov langa tíð.

Konsertin leygarkvøldið var ókeypis, men skipað varð fyri innsavning, sum tilsamans gav 52.660 krónur.



*Tað vóru helst eini 900 fólk í Vesturkirkjuni leygarkvøldið*



*Kórlimirnir úr gospelkórinum VOX sluppu rættiliga at royna seg – bæði sum kór, men eisini sum bakgrundsrøddir hjá øðrum av sangarunum*



*Ásbjørn Berthelsen í hopla, her hann stjórnar teimum ungu sangfuglunum í VOX*



*VOX hevur 10 ár á baki. Fyrr í ár høvdu tey jubileumskonsert í Norðurlandahúsinum*